## Átta lond klár til HM

Eftir undankappingardystirnar leygarkvøldið stóð greitt, at tað nú eru átta lond, sum eru til reiðar at fara til Suðurafrika til HM-endaspælið. Ghana vann seg sum fyrsta afrikanska landið til endaspælið, tá teir vunnu 2-0 á Sudan. Hartil er Suðurafrika sjálvskrivaður luttakari, meðan Australia, Japan, Norðurkorea, Suðurkorea, Holland og Brasil eisini hava spælt seg til endaspælið.



## Hetjan á beinkin

Stóra danska hetjan í 1-1 javnleikinum hjá dønum móti Portugal var uttan iva Brøndby-málverjin, Stephan Andersen. Men mikukvøldið noyðist hann aftur á beinkin at siga. Vanliga er Thomas Sørensen fyrstaval í danska málinum, og tað er hann eisini, nú hann hevur sitið leikbann av sær. Sjálvur staðfesti Stephan Andersen eisini eftir dystin, at hann framvegis er eykamálverji hjá dønum.

# Trý DM-gull til føroyingar

**Rúni Seloy er tvífaldur danskur meistari í kappingini fyri dreingir 14 til 15 ár, og eisini vann Bjørk Herup Olsen eitt gullmerki, tá DM í frælsum ítrótti var á skránni um vikuskiftið**




**Jákup Mørk**

Rúni Seloy, Bjørk Herup Olsen, Rebekka Fuglø og Jan Elmar Sørensen vóru føroysku umboðini, tá DM-kappingin fór av barkastokki í Esbjerg leygardagin.

Samanlagt vunnu tey trý gullmerkir, eitt silvurmerki og tvey bronsumerkir.

Tvey av gullmerkjunum átti Rúni Seloy, sum kappaðist í bólkinum fyri dreingir 14-15 ár. Leygardagin vann hann kappingina á 1500 metrum, og sunnudagin kom hann fyrstur á mál í 800 metra kappingini.

Bjørk vann silvur leygardagin á 1500 metrum, og sunnudagin gjørdist talan um gull á 3.000 metrum. Enntá við at betra føroyska metið við seks sekundum, soleiðis at hetta nú er 10.07,36. Bólkurin hjá henni er gentur 18 til 19 ár.

Jan Elmar Sørensen rann 3.00 metra forðarenning fyri dreingir 18-19 ár, og her gjørdist hann triðbestur av luttakunum.

Og Rebekka Fuglø kappaðist á 400 og 800 metrum fyri gentur 16-17 ár. Hon vann bronsu á 800 metrum og gjørdist nummar fýra á 400 metrum. Her var talan samstundis um nýtt føroyskt met við 1.02,48.



**Rúni Seloy gjørdist um vikuskiftið tvífaldur DM-vinnari í frælsum ítrótti**

## Fyrsta trap-kapping í 16 ár

**Byrsudeildin undir Skjótisambandi Føroya skipaði leygardagin fyri fyrstu FM-kappingini í Trap síðani 1993**

SKJÓTING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Kappingin varð hildin á skjótibreytini hjá Byrsumúla í Sandvíkum.

Níggju luttakarar vóru við í kappingini, sum varð skipað við fýra innleiðandi umførum, áðrenn teir fýra bestu skutu eitt finaluumfar.

Undan finaluni hevði Eirikur Elisson 70 dúgvur og Regin Enghamar 68. Men tað eydnaðist Regini at venda kappingini í seinasta umfarinum og at vinna FM. Samanlagt skeyt Regin 87 av teimum 125 dúgvunum, sum vórðu kastaðar úr torninum.

Úrslitini vóru annars hesi:

**Meistarabólkurin:**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Regin Enghamar | 87 |
| 2 | Eirikur Elisson | 83 |
| 3 | Rúni Debes | 80 |
| 4 | Bogi Wardum | 76 |

**A-bólkurin:**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Esmar Andreasen | 55 |
| 2 | Sámal Debes | 49 |
| 3 | Dorian Petersen | 39 |

# Karina og Joan danmarksmeistarar

**Besta triathlon-liðið í Danmark er hálvt føroyskt. Karina Ottesen og Joan Bláfoss vóru leygardagin við til at vinna liðkappingina í sprint-triathlon**




**Jákup Mørk**

DM-kappingin í sprint-triathlon varð hildin í Ganløse á Norðursælandi. Joan og Karina eru báðar partur av liðnum hjá KTK86 – København Triathlon Klub af 1986 - og tvær ferðir áður hava tær verið við til at vinna gull. Í fjør kiksaði tann parturin tó, og tí var eingin ivi um hvat málið var hesaferð.

Veðrið at kappast í var ikki av tí besta, og sum skilst nervaði hetta serliga súkklingina, sum var nærum hættislig at gjøgnumføra. Men hetta forðaði tó ikki hálvføroyska liðnum í at halda seg frammi í oddinum. Í sprint ræður um at svimja 750 metrar, súkkla 20 kilometrar, og renna 5 kilometrar, og hetta gjørdu tær á KTK86 ein minutt og 20 sekund skjótari enn nakað av hinum feløgunum. Nummar tvey gjørdist OTK úr Odense, meðan Esbjerg Tri & Multisport gjørdist nummar trý.




**Donsku meistararnir í triathlon fyri lið. Frá vinstru eru tað Tanja H. Larsson, Karina Ottesen, Joan Bláfoss og Ann Banke.**